

# øllum triksunum

kortini eitt ynski: At breytin hevði enn fleiri møguleikar.

– Har eru ikki so nógvir møguleikar. Tí verður ein nokkso skjótt troyttur av teimum, tí ein bara kann gera tað sama, sigur hann.

### Gott bretti

Nú skatar6akappingin Xplotion er á skránni, verður Ásgrímur sjálvandi við.

Hann veit longu um fleiri av vinmonnum sínum, sum ætla sær við, og tí fer hann eisini.

Hann er rættiliga væl útgjørdur, tí hansara bretti er eitt av teimum heilt góðu – Element, sum tað kallast.

– Tey eru øgiliga dýr – eg haldi, at tey kosta eini 2.200 kr. í Føroyum, sigur Ásgrímur.

Hann vísir okkum brettið við hjólunum og leiðunum, sum hoyra til. Og vit lata okkum imponera.

– Eg havi sjálvur goldið brettið. Eg keypti tað í Danmark, tí har er tað nógv bíligari, sigur hann skjótur, - sum um hann veit, hvat næsti spurningur okkara verður.

– Eg brúkti ein part av konfirmatiónspengunum til hetta.

## Mest løgna frisuran

Ein onnur kapping, sum longu er í gongd, er kappingin um løgnastu og mest sjáldsomu frisuruna.

Her hava fólk møguleika at senda inn myndir av sær sjálvum ella øðrum við eini undarligari frisuru.

Hetta hava fleiri longu gjørt, og at døma út frá myndunum er nógv gjørt burturúr.

- Onkur frisura er verri enn ein onnur, staðfestir fyrireikarin, Óluvur Guttesen.

Vinningurin í hesi kappingini er kanska ikki heilt óvæntað - ein ókeypis klipping í salongini hjá Madonnu í Havn. Tað er eisini úr hesi salongini at dómararnir eru.

# Tær hugnaðu sær á Svangaskarði

**Leygardagin vóru 44 klinikkassistentar og tannarøktarar, sum arbeiða hjá privatum og kommunalum tannlæknum kring landið, savnaðir í B68-húsinum á Svangaskarði til samveru og hugna. Gestarøðari var Jógvan Fríðriksson, prestur**

SAMVERA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stigtakari til tiltakið er í fyrsta lagi Katrin Jacobsen, sum starvast hjá skúlatannlæknanum, Boga á Steig í Klaksvík. Aðrar, sum hava hjálpt til at reisa hetta tiltak á føtur, eru eitt nú Emma Jacobsen og Bergfríð Jacobsen, sum báðar starvast í Klaksvík.

Á hvørjum ári í nøkur ár hevur fyritøkan, Dansk Nordenta, sum er útvegari av útgerð og tilfari til tannklinikkir, verið í Føroyum og hildið skeið og kunnað klinikkassistentar og tannarøktarar um eitt nú tað nýggjasta, sum er á marknaðinum. Ymiskir fyrilestrar plaga eisini at verða hildnir um ymisk viðkomandi evni í arbeiðinum á eini tannlæknastovu.

- Skeiðið hevur vanliga verið hildið í mai, men við tað, at hendan tíðin ofta hevur verið merkt av verkføllum, er tiltakið í ár flutt til september.

Katrin Jacobsen sigur, at tað var á einum slíkum skeiði í fjør, at hon reisti fyrispurningin, um klinikkassistentar og tannarøktarar kanska høvdu hug at hittast til hugna um eitt ár ella so.

- Tað vísti seg, at tær allar flestu, sum vóru við til tiltakið hjá Dansk Nordenta, høvdu áhuga fyri einum degi, sum í fyrsta lagi snúði seg um samveru og hugna.

Hon sigur, at á árliga og afturvendandi skeiðunum hevur lítil og eingin tíð verið til at læra fólk at kenna, tí alt hevur ligið í so føstum rammum – og síðan eru fólk farin til hús aftur.

- Vit, sum tilsamans eru 98 í tali, kenna nóg illa hvørja aðra – uttan so, at vit eru starvsfelagar ella búgva á somu plássum. Eg helt, at nú var tíðin komin til, at vit, sum starvast innan hetta økið, nú læra hvørja aðra betur at kenna, sigur Katrin.

### Prestur á vitjan

Klinikkassistentarnir og tannarøktararnir møttu á Svangaskarði hendan dagin á middegi. Allar høvdu tær fingið til uppgávu at hava við sær okkurt til frokost, sum varð etin klokkan 13. Her var alt, sum tú kundi hugsað tær – frá kjøtpylsu til salatir av ymiskum slagi.

- Vit søgdu, hvørjar vit vóru, hvar vit arbeiddu, og hvussu leingi vit høvdu arbeitt innan hetta økið.

Katrin sigur, at yngsta kvinnan, sum var við hendan dagin, er 27 og tann elsta er 60.

- Tann 27 ára gamla er lærlingur, og tann 60 ára gamla hevur arbeitt sum á tannlæknastovu síðan 1963 – og hevur bert verið burtur ta tíðina, hon átti børnini.

Klokkan 15 leygardagin kom ein gestarøðari, og hesin var eingin annar enn Jógvan Fríðriksson, sóknarprestur.

- Eg havi hoyrt Jógvan Fríðriksson til onkrar samkomur einar tvær ferðir, og eg haldi, at hann er ógvuliga áhugaverdur. Tað var hann eisini hendan dagin, sigur Katrin.

Løtuna, meðan Sosialurin var inni á gólvinum í B68-húsinum, rungaði láturin um allan salin. Lagið var gott, og bæði prestur og tær 44 kvinnurnar flentu óført at onkrum, sum prestur hevði sagt.

- Prestur tosaði tað mesta av hálvum øðrum tíma, og hann var áhugaverdur alla tíðina, bæði til álvara og gaman. Hann legði dent á, hvussu stóran týdning tað hevur í okkara arbeiði – og hjá fólki sum heild – at vera tey, tey eru. Prestur tosaði eisini um tað at taka ímóti fólki – bæði børnum og vaksnum – í einum bíðirúmi og um týdningin av at vera opin og erligur. Eisini tosaði hann um týdningin av, at tú ikki "tekur" heimið og teir trupulleikar, sum har kunnu vera, við á arbeiðsplássið. Um so er, merkja tey, sum tú umgongst, hetta, og tað kann vera óheppið í tí arbeiði, tú ert sett at gera, sigur Katrin.

### Veitsludøgurði

Tá ið prestur var liðugur, og klokkan var 17, býttu klinikkassistentarnir og tannarøktararnir seg í tríggjar bólkar, har spurningar og hugskot av ymiskum slagi vóru viðgjørd.

- Tú lærir alla tíðina. Øll hava vit nógv at læra – og vit hava eisini nógv at læra av hvørjum øðrum, sigur Katrin.

Klokkan 19.30 var veitsludøgurði, sum Verner Olsen og hansara fólki í B68-húsunum skipaðu fyri og borðreiddu við.

- Við borðhaldið, har vit fingu góðan og vælsmakkandi døgurða, hugnaðu vit okkum rættiliga – við sangum, spølum, kappingum og ymiskum til skemtunar.

Katrin sigur, at hæddarpunktið á kvøldinum var gávan, sum tær allar, sum við vóru, fingu frá Dansk Nordenta.

- Vit fingu eina tasku í part sum eina heilsu frá hesi fyritøkuni, ið selir so nógv til føroyskar tannlæknastovur. Í taskuni var toilett-posi við eitt nú fýra tannbustum og tanntráði. Haraftrat fingu vit ógvuliga vøkur íløt til pipar og salt úr bustaðum stáli, sum tað verður rópt. Hetta var ein góð gáva, sum vit allar vóru ógvuliga glaðar fyri.

Út á náttina hugnaðu tær sær eisini við eitt nú føroyskum dansi.

Katrin sigur, at tær gistu í B68-húsunum um náttina, og morgunin eftir ótu tær "restir" frá tí, sum tær høvdu havt á borðinum dagin fyri.

- Jú, eg haldi, at tiltakið eydnaðist stak væl, sigur Katrin Jacobsen.

Áðrenn tær fóru hvør til sítt sunnudagin, avtalaðu klinikkassistentarnir og tannarøktararnir, at tær skuldu møtast aftur á sama hátt um tvey ár – og tá verða tað kvinnurnar í Suðuroy, sum fara at skipa fyri.



*- Eg havi hoyrt Jógvan Fríðriksson til onkrar samkomur einar tvær ferðir, og eg haldi, at hann er ógvuliga áhugaverdur. Tað var hann eisini hendan dagin, sigur Katrin Jacobsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Katrin Jacobsen (ytst til vinstru), Emma Jacobsen og Bergfríð Jacobsen skipaðu fyri tiltakinum á Svangaskarði*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*